

*Hetta er útferð frá Sanatoriinum heim á Sund. Vit halda okkum bert kenna ein persón á myndini. Tað er kvinnan nr 2 frá høgru í aftara rað. Hetta er Lina Simonsen, ættað úr Norðradali, men gift til Hvítanesar. Á Suðuroyar sjúkrahúsi stendur modellið av eini slupp, sum kallast Lina. Hon er gjørd av sjúklingum á Sanatoriinum til eina lutaseðlasølu. Hon fekk navn eftir Linu í Norðradali. Kennir nakar hinar persónarnir, vilja vit fegin frætta*

Sørvági á sumri. Hann vildi ikki rógva út um veturin, so hetta passaði fínt.

Vanliga plagdu vit at liggja um 5-7.000 pund, tað var sum sagt gott. Veiðan var fyrst og fremst toskur, men tað var eisini nógv hýsa tá. Tá kom so lítið av bátum vestur hagar. Tað vóru bara einir tveir størri bátar. Nú ganga teir so skjótt, soleiðis var ikki tá. At koma úr Klaksvík ella Skálafjørðinum tók tá so langa tíð, so tað var toluliga friðarligt. Vit avreiddu til flakavirkið hjá Niclassen í Sørvági. Prísirnir vóru nakrir heilt aðrir enn nú, um 50 oyru kilo. Eg hevði tann bátin í 23 ár frá 1963 til 1986. Tá gavst eg. Eg var blivin so mikið gamal, at tað var tíð til at gevast. Eg hevði eina manning, sum eg hevði skyldur yvir fyri. So eg fekk mær ein opnan bát, har eg kundi royna einsamallur og vera heilt óheftur, og eg kundi gera sum eg vildi. Dánjal á Vatnsoyrum bygdi mær eitt 10-mannafar við 40 hesta motori.

## Rokveiða eftir kalva

Eina ferð, tá ið hesin báturin var púra nýggjur í 1987, fór eg vestur til Sørvágs at royna við kalvalínu einsamallur. Tað var í apríl og gott veður. Eg setti og fekk 1000 pund. So fór eg til Sørvágs, eg gisti hjá einum svági, og setti kalvan inn á virkið har. Eg hevði sett niður aftur og fór út aftur at draga. Nú vóru aftur 1000 pund á. Men so tók eg kalvan umborð, síðan aftur til Havnar, har eg pakkaði kalvan.

Eg sendi kalvan niður, tá var Marr farin at selja fyri meg.

Tá vóru aftur tveir dagar við góðum streymi og góðum veðri. Tá fekk eg aftur 1.000 pund uppá dagin eystanfyri Stóru Dímun. Hetta var ein góð byrjan. Tað vóru ikki nógvar útreiðslur. Báturin brúkti ikki nógva olju, og hon var bílig, so eg hevði 62.000 krónur í behold hesar dagarnar. Tað var óføra gott.

## Kalvi ikki avreiddur

Um kalva er annars at siga, at hann var ikki aveiddur fyrr enn stutt fyri 2. heimsbardaga. Í yvirliti yvir prísir sæst, at eingin prísur var á kalva fyrr enn í 1934. Tað var ikki fyrr enn ísfiskur og frystur fiskur varð útfluttur, at kalvi kom at vera útflutningsvøra. Men kalvi hevði stóran týdning í húsarhaldinum. Fyrst varð roynt eftir honum við snøri og seinni við línu. Tað bar til at fáa kalva alt árið, men tað gamla var at veiða kalva um várið og summarið.

Tá ið menn fingu kalva fyrr, var hann tikin sundur soleiðis, at tað feita og minni feita varð javnt býtt, og at tað komu so mong riklingakøst burtur úr sum møguligt. Fløkini vóru altíð roknað sum fýra limir. Tað feitasta á kalvanum vóru ravarnir.

Fløkini ristu teir eisini í leingjur og hongdu upp at turka. Tey vóru tá nevnd riklingar. Bæði ravur og riklingar vóru fyrr vanlig at síggja hanga undir hjallinum við einum steini í endanum. Riklingurin varð turkaðir og ofta havdur við til útróðrar

Veiðan var annars býtt javnt millum menninar, sum vóru við. Men gamalt var, at var kalvin so smáur, at tað bar til at lyfta hann upp frá við at halda um stertin, átti viðkomandi sjálvur hendan kalvan. Tá ráddi um at vera handasterkur.

## Skeivt at tráðroyna

Tað hevur stóran týdning at kenna mið fyri at fáa mest burtur úr. Kalvi er á djúpum vatni, so tá ið roynt verður eftir kalva verður sett millum fleiri plinkar, og okkurt tungt verður hongt í línuna fyri at fáa hana at søkka millum plinkarnar. Tá kann tað lukkast at fáa. Við kalvaveiðu er tað eisini umráðandi ikki at fiska í sama plássi dag um dag. Verður flutt kann man blíva við at fáa alt árið av og til á tí sama plássinum. Men um man bleiv við at fiska, kundi tað ganga áravís, áðrenn kalvin kom aftur. Tað er tað sama við toski. Norðhavið ber ikki til at oyðileggja heilt, men Vesturhavið er øðrvísi. Tað eru nógvir smáir toskaplinkar og vóru enn fleiri, tá eg var yngri, sum til dømis Sundalag og Flesjarnir. Um man tekur tann síðsta fiskin, so kemur eingin aftur.



*Jakku er framvegis á floti tá hvøi býðst. Her saman við Johan McDonald fyrst í juni mánaði*



*Meðan Jakku róði út vardi Alvilda borg heima. Mangurin fiskurin kom í húsið, og Alvilda fekk skjótt gjørt fiskin til knettir og frikadellur*



*Gustav pakkar kalva við Fisksentralin*



*Gustav rekir línu við Lágukai*